# Ragnar Isaksen var fremstur



**Ragnar Isaksen var fremstur í Tórshavn Open, sum var um vikuskiftið. Hann hevði 166 sløg í alt**

Uni Holm Johannesen

Kappingin "Tórshavn Open" var um vikuskiftið á golfbreytini á Glyvursnesi. Luttakararnir spældu 18 hol leygarmorgunin, og aftur 18 hol sunnudagin.

Fimtan mans høvdu teknað seg til kappingina, og fremstur var Ragnar Isaksen, tá avtornaði. Hann hevði 166 sløg um holini. Næstur honum var Janus Norðberg, sum hevði 169 sløg.

Talan var um seinastu úttøkukappingina í Føroyum til Oyggjaleikirnar, sum verða á Isle of Wight komandi summar. Úttøkunevndin hjá DNSÍ, sum er deildarsbambandið fyri nýstovnaðan ítrótt, fer nú at meta um úrslitini og taka støðu til, hvørjir skulu umboða Føroyar í golf á oyggjaleikunum.





**FAKTA:**

**ÚRSLITINI UM VIKUSKIFTIÐ**

| | |
|---|---|
| 1. Ragnar Isaksen | 166 sløg |
| 2. Janus Norðberg | 169 sløg |
| 3. Andrias F. Hansen | 170 sløg |
| 4. Eyðun av Reyni | 174 sløg |

# Óvæntaður sigur í merkisverdari kapping

**Atli Danielsen og FC Roskilde vunnu rættiliga óvæntað á útivølli móti FC Fredericia seinnapartin í gjár. Hetta er ársins fyrsti sigur hjá Atla og teimum í næstbestu donsku fótbóltsdeildini, har kappingin ikki tikið tað skap, tey flestu høvdu roknað við**

Rólant Waag Dam

- Hesum hava vit bíðað leingi eftir, var tað fyrsta Atli Danielsen segði, tá vit fingu orðið á hann eftir dystin í gjár. Við trimum málum móti tveimum, eydnaðist tað botnliðnum at basa Fredericia, sum meginpartin av kappingarárinum í fjør luttók í uppflytingarstríðnum.

Trý stig merkja, at FC Roskilde meiri enn tvífaldaði samlaða stigatalið, sum undan hesum umfarinum taldi tvey stig – ein javnleikur móti Skive og annar móti AB farna vikuskiftið. Trý stig merkja eisini, at FC Roskilde dregur fram um tvey onnur lið, og leggur seg røttu megin markið. Eitt mark, teir akkurát megnaðu at halda seg omanfyri í fjør, og sum teir eftir øllum at døma eisini fara at stríðast fyri í ár.

Men hóast FC Roskilde og Atli Danielsen ivaleyst fara at berjast í niðasta partinum av stigatalvuni, so tykist tað sum um, at einki er vist og skal takast fyri givið í donsku 1. división í ár.

Jú, AGF er oddaliðið og tað vera tey allarfægstu, sum fara at megna at gera nakað við teir.

– Tá tað kemur til hini liðini, haldi eg øll kunnu taka stig frá hvørjum øðrum. Tað meti eg eisini, at vit fara at klára, heldur Atli Danielsen.

### Óvæntað úrslit

Metingarnar byggir klaksvíkingurin á úrslitini í deildini higartil í ár. Uppflytararnir Hobro og FC Hjørring hava níggju stig hvør, har Hobro eigur tey fyri tríggjar sigrar, meðan FC Hjørring hevur vunnið tveir, spælt tríggjar javnleikir og soleiðis bara tapt eitt dyst, av teimum fyrstu seks.

Sera óvæntað er tað eisini, at HB Køge, sum í fjør spældi millum landsins bestu lið, men flutti niður, einans er trýs stig frammanfyri Atla Danielsen og FC Roskilde í løtuni. Somuleiðis er tað eisini merkisvert, at eitt lið sum Viborg, sum spældi í Superliguni fyri tveimum árum síðani, ikki hevur fleiri stig enn FC Roskilde.

Viborg hevur annars markerað seg sum eitt felag við nógvum ætlanum. Ein teirra sigur, at liðið um trý ár aftur er at finna millum landsins bestu. Í løtuni røkist tó lítið fyri hesum.

### Nú verður betri

Í mun til Viborg og HB Køge, so høvdu tey flestu ikki vænta tað stóra av FC Roskilde. Við sigrinum í gjár eru teir komnir á beint, men tá skal havast í huga, at teir á ongan hátt hava havt eina lætta skrá tey fyrstu umførini.

- Nei, avgjørt ikki. Vit møttu fleiri av toppliðunum, og næsti dysturin er sambært pappírinum heldur eingin løtt uppgáva, men so koma vit til nakrar dystir, har mótstøðan er lið, vit kunnu meta okkum við, greiðir Atli Danielsen frá. Sostatt er eisini líkt til, at sigrarnir verða tað fleiri.

*rolant@sosialurin.fo*

# Holst á beinkinum

**Eins og landsliðsvenjarin gjørdi seinast, so valdi Troels Bech eisini at seta føroyska landsliðsleikaran á beinkin frá dystarbyrjan. Holst var tískil ikki partur av javnleikinum móti FCK um vikuskiftið**

Rólant Waag Dam

Hvussu nógv Brian Kerr og Troels Bech, ávíkavist landsliðsvenjari hjá føroyska fótbóltslandsliðnum og høvuðsvenjari hjá Silkeborg, tosa saman, er ikki greitt. Greitt er tó, at báðir valdu at síggja burtur frá Christian Lamhauge Holst, tá teir skuldu seta liðið til síðstu uppgávu teirra.

Troels Bech valdi, í mun til Brian Kerr, als ikki at brúka Holst í dystinum. Neyvan var tað høvuðsorsøkin til, at Silkeborg – rættiliga óvæntað – fekk eitt stig burtur úr dystinum, sum teir spældu á útivølli. Men Bech, Holst og hinir kunnu tó allir harmast um, at teir ikki fingu meiri enn tað sama burtur úr.

Silkeborg førdi nevniliga við tveimum málum, tá 55 minuttir vóru spældir, men tað eydnaðist FCK at koma aftur í aftur og javna, soleiðis at dysturin endaði 2-2. Javnleikurin merkir, at Silkeborg framvegis er aftast við fýra stigum og hevur fyrsta sigurin til góðar í ár. Í hinum endanum er FCK fresmt við 20 stigum, fimm fleiri enn FC Midtjylland og Brøndby.

*rolant@sosialurin.fo*